**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 08. sept. 2011**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels O. Eyvindsson,

Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til blaðið "Eftirskúlin nr.7"** | Til 1:<br>Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 2.000,-. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til nýtt tíggjumannafar "Suðring".** | Til 2:<br>Samtykt varð at boða teimum frá, at Hvalbiar Kommuna hevði havt áhuga í at stuðla, um tað var *eitt* kappróðrarfelag fyri alla Suðuroynna. |
| **Mál 3:**<br>**Asfaltering av parkeringsøki og vegi.** | Til 3:<br>Samtykt varð, at kommunan skal leggja asfalt á. |
| **Mál 4:**<br>**Asfaltering av túni.** | Til 4:<br>Samtykt varð, at kommunan skal leggja asfalt á fyri eigarans rokning. |
| **Mál 5:**<br>**Skriv viðv. Geilini í Sandvík.** | Til 5:<br>Samtykt varð, at kommunan skal bøta um gøtuna. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv frá Vatnsýnisnevndini í Sandvík viðv. ánni millum Ytstaveg13 og 15** | Til 6:<br>Samtykt varð at útseta málið til komandi fund. |
| **Mál 7:**<br>**Skriv viðv. vegnum á Drátti.** | Til 7:<br>Samtykt varð, at hildið verður fram við vega-gerðini á Drátti komandi ár. |
| **Mál 8:**<br>**Skriv frá Rúna Thomsen um vegleiðandi fólka-atkvøðu um kommunusamanlegging.** | Til 8:<br>Samtykt varð, at skipað verður fyri hesum til komandi løgtingsval. Fimm fyri og tveir ímóti. |

| | |
|---|---|
| **Mál 9:**<br>**Uppskot til drekkivatnskunngerð til hoyringar.** | Til 9:<br>Samtykt varð at bíða at svara Vinnumála-ráðnum til greitt er, hvørja niðurstøðu vatn-veitingarfeløgini í sóknini koma til. |
| **Mál 10:**<br>**Umsókn at fáa matr. nr.85a og 85e til byggiøki.** | Til 10:<br>Samtykt at fáa matr. nr. 85a og 85e til byggiøki í nýggju byggisamtyktini. |
| **Mál 11:**<br>**Umsókn um sundurbýti matr. nr. 12a.** | Til 11:<br>Samtykt varð at viðmæla sundurbýti. |
| **Mál 12:**<br>**Umsókn um byggiloyvi til bilskúr á matr. 155b.** | Til 12:<br>Samtykt at Tekniska nevnd fer á staðið. Eru øll viðurskifti í lagi, verður byggiloyvi givið út frá givnum upplýsingum og skitsum. |
| **Mál 13:**<br>**Skriv viðv. Heksá.** | Til 13:<br>Samtykt varð, at kommunan metir arbeiðið vera í lagi, men at Tekniska nevnd skal fara á staðið. |